# Tannlæknaváttan

## Ortodontisk tannviðgerð og tannprotesur

í sambandi við umsókn um hjálparráð sambært § 29 í lóg um almannatrygd og tænastur og § 14 og fylgiskjali 3 í kunngerð um hjálparráð

### Upplýsingar umsøkjarans

| | | | |
|---|---|---|---|
| Navn (barnsins navn, um søkt verður til barn) | | P-tal | |
| Bústaður | | Fartelefon | |
| Postnummar, bygd/býur | | Telefon | |
| Teldupostur | | Tannlækni | |

### Diagnosa

Talan skal verða um funktionelt oyðileggjandi ella kosmetiskt misprýðandi avleiðingar av:

1) **vanlukkutreytaðum** skaða á tyggiorgan (tenn, munn, kjálkabein og umgevandi vevnað),
2) **neyðugari** læknaligari ella tannlæknaligari viðgerð, sum hevur við sær skaðar á tyggiorgan, ella
3) **viðføddum** álvarsligum skeivleikum, sum ávirka tyggigagnið.

| | |
|---|---|
| Greið frá um, hvat av omanfyri standandi punktum, viðkomandi lýkur | |

### Viðgerðarætlan

**Einans viðgerð, sum er protetisk, og tannrætting koma undir § 14 í kunngerð um stuðul til hjálparráð**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. Frágreiðing um og grundgeving fyri tilráddu viðgerðini | | | | | | |
| 2. Alternativ til tilráddu viðgerðina – mest neyðuga og bíligast nøktandi loysn | | | | | | |
| 3. Kostnaðarætlan, myndir og/ella røntgenmyndir (kann viðleggjast) | | | | | | |
| 4. Hevur viðkomandi gingið til regluliga tanneftirlit? | Ja | ☐ | Seinasta eftirlit var tann | | Nei | ☐ |

### Váttan

Upplýsingarnar í hesi váttan eru knýttar at endamálinum við váttanini og kunnu tí einans leggjast til grund fyri málviðgerðini í Almannaverkinum

| Dagfesting | Stempul og undirskrift tannlæknans/-teknikarans |
|---|---|
| | |

**Váttanin skal sendast ella latast inn til Almannaverkið.**



Staravegur 18 • Postboks 3096 • FO-110 Tórshavn
Tel 360000 • Faks 360001 • av@av.fo • www.av.fo

# Tannlæknaváttan

## Ortodontisk tannviðgerð og tannprotesur

í sambandi við umsókn um hjálparráð sambært § 29 í lóg um almannatrygd og tænastur og § 14 og fylgiskjali 3 í kunngerð um hjálparráð

## Upplýsing um stuðulstreytir

**Ein umsókn um fíggjarligan stuðul til ortodontiska tannviðgerð og tannprotesur skal verða játtað av Almannaverkinum, áðrenn umsøkjarin setir seg fyri útreiðsluni av viðgerðini, t.v.s. áðrenn viðgerðin byrjar.**

Tá stuðul verður veittur eftir hesum reglum, hava fíggjarligu viðurskiftini hjá umsøkjaranum ongan týdning.

**Fyritreytir fyri at fáa stuðul til tannprotesu ella ortodontiska tannviðgerð**

Talan skal vera um funktionelt oyðileggjandi ella kosmetiskt misprýðandi avleiðingar av

1) Vanlukkutreytaðum skaða á tyggiorgan (tenn, munn, kjálkabein og umgevandi vevnað) sum trygging ikki tekur við,
2) neyðugari læknaligari ella tannlæknaligari viðgerð, sum hevur við sær skaðar á tyggiorgan, ella
3) viðføddum álvarsligum skeivleikum, sum ávirka tyggigagnið.

**Til 1 og 3**
**Tannstøðuskeivleikar, sum geva rætt til stuðul eru:**

a) Oyðilegging av vevnaði har vandi er fyri brendum tonnum (karies), bruna á tannhaldi (paradontesu), skaða á frammtonnum (trauma) ella burturmáða rót (rótreserptión). Objektiv symptomir eru ógvuslig trongstøða, djúp bit, trongstøðuyvirbit, stór yvirbit og ella skeiv vakstarlega av tonnum.
b) Skaðiligar funktiónir so sum skeivur andlitsvøkstur, læst ella skeiv muskulfunktión, skeiv funktión í kjálkaliðum, høvuðpína, skeiv varra- og tungufunktión ella talufeilir, ofta lesp. Objektiv symptomir eru tvungin krossbit, skeiv mitta, læst saksbit, tvungin læst mesial og distal jakslabit, stór yvirbit ella fleiri ikki anlagdar tenn (multiplex aplasiir).
c) Sálarlig/sosial lýti/brek orsakað av útsjónd, sum víkur nógv frá, útsjónd, sum stiðjar fordómar, talufeilum, brendum tonnum ella váð í tannhaldi. Objektiv symptomir eru umframt tey somu sum nevnd eru undir a stórt yvirbit, undirbit, opniubit, tvungin kross- og saksabit, óvuslig trongstøða ella óvanlig spreiðistøða.

**Til 2**
**Neyðug læknalig ella tannlæknalig viðgerð, sum hevur við sær skaða á tyggiorgan, sum gevur rætt til stuðul er:**

a) Sjøgren syndrom.
b) Læknafyriskipaður heilivágur, ið verður nýttur beinileiðis í sambandi við viðgerð av krabbameini. Stuðul verður ikki veittur til heilivág ímóti vamli, morfika og øðrum heilivági, ið ikki er krabbameinsbasandi heilivágur.

Við protesu er at skilja eitt uppískoyti ella ein afturatlegging. Tannprotesan kann verða føst (krúnur, brúgv) ella leys; og talan kann vera um fulla ella partvísa protesu. Føst protesa verður einans veitt, tá hetta er einasta ráðiliga loysnin.

Stuðul verður ikki veittur til viðlíkahald eftir hesum reglunum. Stuðul til viðlíkahald kann verða veittur eftir vanligu reglunum í § 19 stk. 2 í lóg um almannatrygd og tænastur ella § 12 stk. 1 í almannapensjónslógini.

Stuðul verður einans veittur til tann partin av viðgerðini, sum er neyðug til gerð og fastgerð av omanfyrinevndu protesum, ið ikki er at meta sum sjúkrahúsvirksemi.

Tað er ein treyt fyri stuðli til ortodontiska tannviðgerð og tannprotesur, at útreiðslan ikki verður goldin av Heilsutrygd, vanlukkutryggingini ella aðrari trygging.

Tað skundar undir viðgerðina av umsóknini, um myndir og/ella røntgenmyndir verða viðlagdar tannlæknaváttanini.

**Umsóknarblað um stuðul til hjálparráð fæst á heimasíðuni hjá Almannaverkinum.**


Staravegur 18 • Postboks 3096 • FO-110 Tórshavn
Tel 360000 • Faks 360001 • av@av.fo • www.av.fo